# Bíblian sum teknirøð

Heimamissiónsforlagið hevur givið út bókina ”Bíbilsk teknirøð” eftir Jeff Anderson og Mike Maddox. Í bókini eru Gamla og Nýggja testamenti myndað sum teknirøð. Fyrr í mánaðinum kom út bókin ”Bíbilsk teknirøð”. Í bókini, sum er 256 síður til støddar, eru partar av Gamla og Nýggja testamenti myndaðir sum teknirøð í litum. Vivian Ole-Jacobsen hevur týtt bókina til føroyskt. Forlagið skrivar m.a.: Í bíbliuteknirøðini eru tær kendastu og týdningarmestu frásagnirnar úr heimsins mest lisnu bók. Tekningar og frásagnir hava eina slíka styrki, at tað er ómøguligt ikki at verða rivin við. Uppsetingin er gjørd hjá SETT í Nesvík. Bókin er prentað í Kina og kostar 125 krónur.




# Astra er ársins brúktbilur

Opel Astra er kosin ársins brúktbilur í 2010. Hetta er samstundis ein staðfesting av at ringa umdømið hjá bilinum er burtur. Íalt vóru 10 bilamodell við í metingini, sum nú greitt sigur frá, at Opel kann gera bilar, sum halda leingi og bert hava smærri útreiðslur til umvælingar og viðlíkahald. Opel Astra-bilurin frá 2005 vann á Skoda Octavia 2007 og VW Golf frá 2005. Sagt verður, at Astra-modellið fekk eina ringa byrjan, tá tað kom á danska marknaðin í 1991. Men síðani er vent í holuni.

# Sjúklingar fáa gávu frá Føroya Arbeiðarafelag

**Føroya Arbeiðarafelag fer nú at keypa sjúklingum á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn nýggjar teldur ístaðin fyri tær, sum vórðu stolnar av hotellinum herfyri**

GÁVA
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Sjúklingarnir á sjúklinga-hotellinum Tórshavn í Keypmannahavn fáa nú eina stórfingna gávu frá limunum í Føroya Arbeiðarafelag.

Á aðalfundinum hjá felagnum um vikuskiftið skeyt Fríðhild Winther úr Skopun upp, at limirnir í Føroya Arbeiðarafelag skuldu stuðla teimum, sum búgva á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn við nýggjum teldum.

Tey hava havt fleiri teldur á hotellinum, men herfyri vórðu fimm av teimum stolnar av hotellinum og nú hava tey bara eina eftir, fortaldi skopunarkonan fundafólkinum í Føroya Arbeiðarafelag.

- Teldur hava ómetaliga stóran týdning fyri tey, sum koma soleiðis fyri, at tey hava tørv á at verða á hotellinum, segði hon.

Serliga er teldan hent amboð hjá teimum tá ið tey skulu hava samband við Føroyar, tí har kunnu tey lesa tíðindi úr Føroyum, lurta eftir Kringvarpinum, Rás2 og Lindini og hyggja at Degi og viku og øðrum sjónvarpssendingum, umframt at tey kunnu senda t-brøv og tosa ókeypis í telefon.



*Á aðalfundinum í Føroya Arbeiðarafelag um vikuskifti, var full undirtøka fyri at stuðla sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn við nýggjum teldum*

Fundarfólkið tók fult undir við uppskotinum og fleiri førdu fram, at hetta var eitt sera væl valt endamál at stuðla og Hotel Tórshavn er eitt pláss, sum øll kunnu fáa brúk fyri.

Tað endaði við, at tey ymsu lokalfeløgini í Føroya Arbeiðarafelag betala hvør sín part og so betalir megin-felagið tað, sum restar í.

# Samgongan lovar eitt og ger tað øvugta

**Ingeborg Vinther harmast um samgongan ikki heldur lyfti um at seta arbeiðsskapandi tiltøk í verk**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hvar eru arbeiðini, sum samgongan hevur lovað at seta í verk.

Tað spurdi Ingeborg Vinther, forkvinna í Føroya Arbeiðarafelag í ársfrágreiðing síni á aðalfundinum um vikuskiftið.

Hon sipar til nógv umrødda ólavsøkupakkan, har tað varð staðfest, at tað almenna skuldi seta arbeiðsskapandi tiltøk í verk.

- Men hvar eru hesi arbeiðini. Tað, ið vit hava upplivað higartil, er tvørturímóti, at tað almenna, serliga landsverk, hevur sagt tímalønt fólk úr starvi.

Hon harmast eisini um, at eingi tekin hava verið at sæð um nakran vilja til at at seta arbeiðsskapandi tiltøk í verk, ikki eitt einasta.

- Tey arbeiði, ið hava verið bjóðað út higartil, eitt nú Landssjúkrahúsið og ellisheimið í Vági, eru íslendskar byggifyritøkur farnar avstað við.

- Tað er nú, at tað almenna skal lata føroysku byggifyritøkurnar fáa almenn arbeiði, sjálvt um tað kostar nakað meir. Tað verður vunnið inn aftur í skattakrónum, tá ið okkara fólk fær arbeiðið, sigur forkvinnan.

Hon staðfestir, at líkt er til, at samgongan ikki er arbeiðsfør, nú ið kassin er tómur og einki er at gjara út við.

- Teir tora ikki at taka neyðugar avgerðir, har neyðugt er at spara, tí teir eru so bangnir um atkvøðurnar til eitt komandi val.

Ingeborg Vinther staðfestir, at enn er fiskivinnan okkara høvuðsvinna og hon skilir ikki heilt gremjanina um, at hon skal fáa so nógvan studning.

Hvat við øðrum londum, har nógvar vinnur fáa studning í stóran stíl. Hvussu nógvan studning letur ES ikki landbúnaðinum? Fyri at fáa fólk at støðast í útjaðaranum, hevur fiskivinnan í Norðurnoregi fingið nógvan stuðul. Hetta gevur arbeiðspláss og kemur landskassanum aftur til góðar.

- Tá ið fiskivinnan gongur illa, fiskaprísirnir eru lágir, lítil fiskur kemur upp á land, virkini standa tóm fyri tað mesta, tá gongur einki.

- Landsbúskapurin ekur á knøunum, tí fiskivinnan er í kreppu. Hetta skapar fíggjarkreppu. Hvussu ber tað til, at fiskivinnan fyri summi er meira eitt haft um beinini? - Eg haldi, at nógv gloyma, at vit enn bert hava fiskivinnu og alivinnu at dúva uppá, um vælferð skal vera í samfelag okkara, staðfesti Ingeborg Vinther.

# 70 sjúklingar um eina teldu

**Á Hotel Tórshavn eru tey ómetaliga fegin um gávuna frá Føroya Arbeiðarafelag, tí har hava tey bara eina teldu til sjúklingarnar, sum eru 70 í tali í løtuni**

FØROYA ARBEIÐARAFELAG
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Hetta var ómetaliga vakurt gjørt av teimum.

Tað var fyrsta reaktiónin vit fingu frá starvsfólkinum á sjúklingahotellinum, Tórshavn í morgun, tá ið vit ringdu og fortaldu teimun, at Føroya Arbeiðarafelag hevur samtykt at stuðla teimum við nýggjum teldum.

Sum greitt er frá í aðrari grein her á síðuni, samtykti fundarfólki á aðalfundin í Føroya Arbeiðarafelag, einmælt at geva sjúklingunum á Hotel Tórshavn í Keypmannahavn, nýggjar teldur til gávus.

- Vit áttu seks teldur, men eina náttina herfyri høvdu vit innbrot og tá vóru fimm av teldunum stolnar.

- Sostatt hava vit nú bara eina teldu eftir, sum øll skulu skiftast um at brúka. Í løtuni eru 70 sjúklingar á hotellinum, so tað er skilligt, at teldan er smábýtt.

Tí er tað ein ómetaliga kærkomin gáva, sum vit takka so miriliga fyri, sigur starvsfólkið á Hotel Tórshavn.

Tey siga, at annars verða teldurnar nógv brúktar og at tað tí var ein sera svárur missur, tá ið teldurnar vórðu stolnar.

- Sjúklingarnir brúka tey at samskifta við á sosialum heimasíðum, tær verða eisini brúktar til at senda og skriva t-brøv við, at lurta eftir radio og hyggja at sjónvarpið, tær verða brúkar til at bíleggja ferðaseðlar við og sjálvandi eisini at lesa bløð og føroyskar heimasíður at frætta tíðindi.

# Føroya Abeiðara felag nýggjan nevndarlim

Føroya Arbeiðarafelag fekk ein nýggjan nevndarlim á aðalfundi felagsins um vikuskiftið.

Á aðalfundinum stóðu fýra av teimum sjey nevndarlimunum fyri vali. Teir vóru Agnar Olsen úr Hósvík, Georg F. Hansen úr Miðvági, sum er næstformann, Sunrid Vang úr Froðba og Margretha Rasmussen úr Fuglafirði.

Margretha Rasmussen boðaði frá, at hon tók ikki við afturvali og í hennara stað var Elin Sørensen úr Havn, vald.

Hon hevur arbeitt á skrivstovuni í Føroya Arbeiðarafelag í 10 ár og hevur verið limur í felagnum alla tíðina og hon var tiltakslimur í gomlu nevndini.

Hini trý í nevndini vórðu øll afturvald og somuleiðis var Georg F. Hansen afturvaldur til næstformann.

Hinir nevndarlimirnir í Føroya Arbeiðarafelag eru Ingeborg Vinther, forkvinna, Karla Einarsson úr Rituvík og Jógvan Páll Johansen úr Haldórsvík.

Fyrsti tiltakslimur er nú Dora Mikkelsen úr Gøtu, annar tiltakslimur er Julia Hansen, úr Æðuvík og triði tiltakslimur er Kristian Joensen úr Leirvík.